# Kjak



Eyðun Mohr Viderø

## Hvussu nógv kostar blíðskapur?

Síggi á portalinum hjá Sosialinum, at blaðmaður nevndur Rógvi Nybo hevur uppgerð yvir, hvussu nógv tað kostaði løgmanni at gera ein »fínan« galladøgurða fyri kongshjúnunum, ið vitja Føroyar í hesum døgum.

Eru hatta spennandi tíðindi? Sjálvsagt kostar ein betri máltíð rættuliga nógv til so framstandandi fólk, men eiga vit alment at seta roknskapin á prent.

Vit kenna til í privata gerandisdegnum, at viðhvørt vilja vit gera nógv burturúr og bjóða ávísum vinum og kenningum inn á gólvið til eina betri máltíð við øllum tilhoyri.

At hugsa sær, um vit dagin eftir fóru út alment um, hvussu nógv »veitslan« kostaði?

Tað ger man ikki!

Tað ger man heldur ikki, tá vit hava vitjan av kongshjúnunum!

So kannst tú vera royalistur ella ikki!



Finnleif Guttesen

## Snýta bankarnir kundarnar fyri at fáa milliónir í kassan?

Hetta hugsa nógvir kundar nú teir síggja, at bankarnir taka avgjald fyri ymiskt, sum eingin hevur biðið um, t.d. kontoavrit ( 8 stk. í síðstu viku), avgjøld, sum mann ikki sær hvat er fyri, gebyr við afturvirkandi kraft og sikkurt mangt annað.

Vendur man seg til bankarnar, siga teir, at tað skulu teir nokk rætta, men veruleikin er, at eingin rætting fer fram, ella ógvuliga seint, so kundarnir gloyma hesar 5-10-15 kr. , sum eru tiknar av kontum og geva bankunum milliónir í kassan.

Síðani nýggi netbankin er komin, hevur tað av og á verið ómøguligt at flutt pengar gjøgnum netbankan, og er man tá noyddur at fara í sjálvan bankan fyri at gera flytingar, og hetta óskilið skal kundin eisini gjalda fyri.

Hví rætta bankarnir ikki skeivleikarnar?

Verða kundarnir snýttir, eg spyrji bara?

Hvar er brúkaraumboðsmaðurin?



Helgi Fossádal
*stjóri á Listasavni Føroya*

## Rætting um Bente Scavenius og Astri Luihn

Í Dimmalættng nr. 124 nú um vikuskifti umælir Kinna Poulsen framsýningina hjá Astri Luihn í Listasavni Føroya. Tað er ein góður siður, ikki at svara ummælum, so tað ætli eg mær ikki at gera. Tó kenni eg meg noyddan at tala at, tí Kinna Poulsen sigur ósatt um hin annars høgt virda danska rithøvundin og listfrøðingin Bente Scavenius, ið til framsýningina hevur skrivað bók um Astri Luihn og hennara list.

*Bente Scavenius ger vánaligt research til bókina, skrivar Kinna Poulsen, og rør fram undir at hon pyntar tekstin og sigur ósatt, tá hon skrivar, at Astri Luihn prentaði sína framsýning í Norðurlandahúsinum á vári í 1999 á grafiska verkstaðnum í Listasavninum. Kinna Poulsen sigur, at leiðararnir á Steinprent, eina tíð kallað Grafiski verkstaður Føroya, Jan Andersson og Fríða Matras Brekku, einki siga seg minnast um hetta, og tí kann tað ikki vera rætt.*

***Nú kann so hvør í sínum lagi meta um, hvør ger vánaligt research***

Astri Luihn hevði framsýning í Norðurlandahúsinum á vári í 1999, sum Bente Scavenius púra rætt skrivar. Grafiska verkstaðið í Listasavninum byrjaði í 1993, og har prentaði Astri Luihn síni grafiski verk tíðliga í 1999. Jan Andersson og Fríða Matras Brekku í Steinprenti høvdu einki við hesa prenting at gera heilt einfalt, tí tey arbeiddu ikki har tá. Tey komu seinni sama ár. Fleiri listafólk og fleiri vitjandi grafikarar arbeiddu har hesi árini. Annars var Bárður Jákupsson stjóri á Listasavni Føroya tá - møguliga minnist hann hetta.

Bente Scavenius hevur ikki vánaligt research, tí soleiðis var tað.

Tað var Bárður Jákupsson, ið bjóðaði Astri Luihn at hava serframsýning í Listasavninum í 2004 og ikki í 2006, sum Kinna Poulsen sigur.

Nú kann so hvør í sínum lagi meta um, hvør ger vánaligt research. Hvat Kinna Poulsen annars skrivar um framsýningina og mest um alt møguligt annað, er í hesum sambandi óviðkomandi. Ummæli hennara hevði tó vunnið almikið, um hon hevði dugað at grundgivið fyri sínum meiningum. Ein einsamallur kakumetaforur er ikki nóg mikið.



Tordur J. Niclasen

## Almennur stovnur leggjast á Eiði!

### – Áheitan á landsstýrið

Ringt er at fáa eiga á eftir hvørjum leisti farið verður til verka, tá talan er um at leggja almennars stovnar kring landið.

Fyri tíð síðan var almennur stovnur lagdur til Klaksvíkar og unna vit norðoyingum væl hesi arbeiðsplássini, sum nýggi stovnurin hevur havt við sær.

Mangur setti sær spurningin, hví at hesin stovnur varð lagdur júst í Klaksvíkar?Nakað av orðaskifti tók seg eisini upp á tí politiska leikvøllinum.

Niðurstøðan var, at avvarðandi landsstýrismaður hevði tikið avgerð, at so skuldi vera – og tí bleiv tað soleiðis!

Vísast kundi ikki til nakra greiða managongd ella haldgóða grundgeving í støðutakanini!

Ein skuldi trúð, at tá talan er um at leggaj nýggjar stovnar ella flyta stovnar út kring landið, so var eisini hugt eftir, í hvønn mun almennir stovnar eru har frammanundan, væl at merkja, um tað er arbeiðsplássini politiski myndugleikin hugsar um!

Nú hevur politiskur turbolensur aftur tikið seg upp í samband við, at landsstýrismennirnir í ávikavíst fíggjar-og vinnumálum hava ætlanir um at flyta stovn(arbeiðspláss) úr Havnini til Tvøroyri.

Landsstýriskvinnan í innlendismálum vil hava løgmann at steðga ætlanini og krevur politiska viðgerð av málinum!

Rosa Samuelsen, landsstýriskvinna í almennamálum fer í næstum at taka støðu til hvar "nýggjur" stovnur til ung skal leggjast.

Vónandi kann vísast til haldgóðar grundgevingar, tá avgerðin er tikin! Vónandi verður hugt eftir neyðugum fortreytum fyri slíkan stovn ,áðrenn avgerðin verður tikin!

Tá umstøðurnar og fortreytirnar á Eiði eru avbera góðar, vil eg við hesum heita á landsstýriskvinnuna at bera so í bandi, at stovnurin kemur at liggja á Eiði.

Umframt at bygdin tá far nøkur almenn arbeisðspláss, fáa tey, íð koma at búgva og arbeiða á stovninum góðar lokalar umstøður at virka undir.